


*Skilmenninir báðir, Bjarni Djurholm, varaløgmaður, og Jacob Hansen*

# Stórt 100 ára føðingardagshald

**Seinnapartin ígjár var stórsligið 100 ára føðingardagshald hildið fyri glyvramanninum Jacobi V. Hansen á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík. Har hevur hann verið búsitandi tey seinastu 3 árini. Fleiri gestir vóru komnir saman og umboð fyri myndugleikarnar vitjaðu og hildu røðu**

FØÐINGARDAGUR
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

### Talur til borðhaldið

Borðhaldið var hildið í veitslusalinum í nýbygda partinum av Ellis- og Røktarheimi í Runavík og hetta riggaði avbera væl. Fyri uttan ta nærmastu familjunavóru fleiri kenningar og eisini fólk úr grannalagnum á Glyvrum komin at heilsa uppá Jacob. Tann eini sonurin var komin heilt úr USA við konu.

Góður matur, sangur og røður vóru á skránni. Eftir at Tordur Niclasen hevði bjóðað vælkomin legði dóttir Jacob, Jona Jacobsen, fyri við røðu um uppvøkstur sín á Glyvrum og um pápa sín. Jóannis Eidesgaard, løgmaður, var burturstaddur í arbeiðsørindum í Suðurjútlandi, so Bjarni Djurholm umboðaði løgmann við røðu og ynskjum á tí stóra degnum. Varaløgmaður kundi eisini siga frá at hann sjálvur gjøgnum pápa sín er í ætt við føðingardagsbarnið. Bjarni rósti Jacobi og hansara ættarliðið fyri tí, ið komið er av skafti og sum hevur lagt lunnar undir framburðin í Runavíkar Kommunu.

Av øðrum persónum frá myndugleikunumvarlandsstýrismaðurin í almennu- og heilsumálum Hans Pauli Strøm við til haldi og helt eisini røðu. Hann metti Jacob verða uppvaksnan í einum umhvørvi har bókin lá frammarlaga. Mammubeiggi Jacob, Hans Djurholm, hevði nevniliga skiparaskúla í kjallaranum hjá sær sjálvum á Glyvrum og



*Nógv nýttu høvið at heilsa uppá Jacob Hansen hin 27. juni*



*Torbjørn Jacobsen heilsar uppá fødselarin*



*Dóttir Jona Jacobsen legði fyri eini góðari og rørandi røðu*